# Fótbóltssamband Føroya

**Gundadalur, Postboks 3028, FO-110 Tórshavn**

## Ársfrásøgn

## 2025

**AVRIT**

Ársfrásøgnin er løgd fram og góðkend á FSF's ársaðalfundi, tann / .

______________________________

Petur Even Djurhuus
fundarstjóri

# Innihaldsyvirlit


| | Síða |
|---|---|
| **Átekningar** | |
| Leiðsluátekning | 1 |
| Átekning frá óheftum grannskoðara | 2 |
| **Upplýsingar um felagið** | |
| Upplýsingar um FSF | 5 |
| **Ársroknskapur 1. januar - 31. december 2025** | |
| Nýttur roknskaparháttur | 6 |
| Rakstrarroknskapur | 9 |
| Fíggjarstøða | 10 |
| Notur | 12 |

## Leiðsluátekning

Nevnd og stjórn hava í dag viðgjørt og samtykt ársfrásøgnina fyri 2025 hjá Fótbóltssamband Føroya.

Ársfrásøgnin er gjørd í samsvari við ársroknskaparlógina.

Tað er okkara fatan, at nýtti roknskaparhátturin er hóskandi, og at ársroknskapurin gevur eina rættvísandi mynd av ognum, skyldum og fíggjarligu støðu pr. 31. december 2025 og av úrslitinum av virksemi fyri roknskaparárið 1. januar - 31. december 2025.

Ársfrásøgnin verður løgd fyri ársaðalfundin við tilmæli um góðkenning.

Tórshavn, tann 18. februar 2026

**Daglig leiðsla**

Kristin Dam Ziska
aðalskrivari

**Starvsnevnd**

Christian Andreasen
forseti

Róin Schrøter
varaforseti

Jóannes Prestá
nevndarlimur

Heri á Rógvi
nevndarlimur

Anja Rein
nevndarlimur

Sólrun Hendriksdóttir Sørensen
nevndarlimur

Maria Jóhannusardóttir Joensen
nevndarlimur

## Átekning frá óheftum grannskoðara

**Til limafeløgini í Fótbóltssamband Føroya**

**Niðurstøða**

Vit hava grannskoðað ársroknskapin hjá Fótbóltssamband Føroya fyri roknskaparárið 1. januar - 31. december 2025 við nýttum roknskaparhátti, rakstrarroknskapi, fíggjarstøðu og notum. Ársroknskapurin er gjørdur eftir ársroknskaparlógini.

Tað er okkara fatan, at ársroknskapurin gevur eina rættvísandi mynd av ognum, skyldum og fíggjarligu støðuni pr. 31. december 2025 hjá felagnum og av úrslitinum av virkseminum hjá felagnum í roknskapar-árinum 1. januar - 31. december 2025 samsvarandi ársroknskaparlógini.

**Grundarlag fyri niðurstøðuni**

Grannskoðanin er løgd til rættis í samsvari við altjóða standardir um grannskoðan og aðrar ásetingar, sum eru galdandi í Føroyum. Okkara ábyrgd eftir hesum standardum og ásetingum er nærri greidd frá í niðanfyri standandi broti "Ábyrgd grannskoðarans av at grannskoða ársroknskapin". Vit eru óheft av felagnum samsvarandi altjóða reglunum hjá International Ethics Standards Board for Accountants' um etiskan atburð hjá grannskoðarum (IESBA Code) og øðrum etiskum krøvum, sum eru galdandi í Føroyum. Vit hava eisini hildið hinar etisku skyldurnar, sum ásettar eru í hesum krøvum og IESBA Code. Tað er okkara fatan, at vit hava fingið nøktandi grannskoðanarprógv, ið kunnu vera grundarlag undir okkara niðurstøðu.

**Ábyrgd leiðslunnar av ársroknskapinum**

Leiðslan hevur ábyrgdina av at gera ein ársroknskap, ið gevur eina rættvísandi mynd í samsvari við árs-roknskaparlógina. Leiðslan hevur harumframt ábyrgdina av tí innanhýsis eftirliti, ið leiðslan metir skal til, fyri at ársroknskapurin kann gerast uttan týðandi skeivleikar, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum.

Tá ársroknskapurin verður gjørdur, hevur leiðslan ábyrgdina av at meta, um felagið megnar at halda fram við rakstrinum; at upplýsa um viðurskifti viðvíkjandi framhaldandi rakstri, har tað er viðkomandi; umframt at gera ársroknskapin eftir roknskaparmeginregluni um framhaldandi rakstur, uttan so at leiðslan hevur í hyggju at avtaka felagið, steðga rakstrinum, ella at leiðslan í roynd og veru ikki hevur annan møguleika enn at gera tað.

**Ábyrgd grannskoðarans av at grannskoða ársroknskapin**

Okkara endamál er at fáa grundaða vissu fyri, at ársroknskapurin í síni heild ikki hevur týðandi skeivleikar, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum, og at geva eina grannskoðanarátekning við eini niðurstøðu. Grundað vissa er vissa á høgum stigi, men er ikki full trygd fyri, at ein grannskoðan, sum er gjørd eftir ásetingunum í altjóða standardum um grannskoðan og øðrum ásetingum, sum eru galdandi í Føroyum, altíð kann avdúka týðandi skeivleikar, tá slíkir eru. Skeivleikar kunnu koma fyri orsakað av sviki ella mistøkum og kunnu metast at vera týðandi, um tað kann væntast, at teir hvør sær ella saman ávirka fíggjarligu avgerðirnar, sum roknskaparbrúkararnir taka við støði í ársroknskapinum.

## Átekning frá óheftum grannskoðara

Sum ein liður í grannskoðanini, ið verður gjørd eftir altjóða standardum um grannskoðan og øðrum ásetingum, sum eru galdandi í Føroyum, gera vit yrkisligar metingar og hava eitt yrkisligt ivingarsemi undir grannskoðanini. Har vit eisini:

- Eyðmerkja og meta um váðan fyri týðandi skeivleikum í ársroknskapinum, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum, leggja til rættis og gera tey grannskoðanararbeiðir, sum hesir váðar krevja, umframt fáa til vega tey grannskoðanarprógv, sum eru nøktandi at vera grundarlag undir okkara niðurstøðu. Váðin fyri ikki at varnast týðandi skeivleikar, sum standast av sviki, er størri, enn tá talan er um týðandi skeivleikar, sum standast av mistøkum, tí svik kann vera av samanløgdum ráðum, skjalafalsan, tilætlaðari burturúrlegging, villleiðingum ella við at skúgva innanhýsis eftirlitið til viks.

- Fáa eina fatan av innanhýsis eftirlitinum, sum er viðkomandi fyri grannskoðanina, fyri at kunna leggja grannskoðanina til rættis eftir umstøðunum, men ikki fyri at kunna gera eina niðurstøðu um dygdina á innanhýsis eftirlitinum.

- Taka støðu til um roknskaparhátturin, sum leiðslan nýtir, er hóskandi, og um tær roknskaparligu metingarnar og tilhoyrandi upplýsingar, sum leiðslan hevur gjørt eru rímiligar.

- Gera niðurstøðu um, hvørt tað er hóskandi, at leiðslan hevur gjørt ársroknskapin við støði í roknskaparmeginregluni um framhaldandi rakstur, umframt um tað við støði í teimum grannskoðanarprógvum, sum eru fingin til vega, er týðandi óvissa um hendingar og viðurskifti, sum kunnu viðføra týðandi iva, um felagið megnar at halda fram við rakstrinum. Um okkara niðurstøða er, at tað er ein týðandi óvissa, skulu vit í okkara grannskoðanarátekning vísa á upplýsingar um hesi viðurskifti í ársroknskapinum ella, um hesar upplýsingar ikki eru nøktandi, tillaga okkara niðurstøðu. Okkara niðurstøður byggja á tey grannskoðanarprógv, sum vit hava fingið fram til dagfestingina á okkara grannskoðanarátekning. Hendingar og viðurskifti í framtíðini kunnu tó føra við sær, at felagið ikki longur megnar at halda fram við rakstrinum.

- Meta um samlaðu framløguna, bygnaðin og innihaldið í ársroknskapinum, herundir upplýsingarnar í notunum, umframt um ársroknskapurin vísir tey undirliggjandi handilsviðurskifti og hendingar á ein slíkan hátt, at tað gevur eina rættvísandi mynd av hesum.

Vit samskifta við ovastu leiðsluna um millum annað vavið á ætlaðu grannskoðanini, og nær grannskoðað verður, og eisini um týðandi eygleiðingar, herundir um møguligar týðandi manglar í innanhýsis eftirlitinum, sum vit eyðmerkja undir grannskoðanini.

## Átekning frá óheftum grannskoðara

Tórshavn, tann 18. februar 2026

**P/F Januar**
løggilt grannskoðanarvirki

Óli Joensen
statsaut. revisor

## Upplýsingar um FSF

| | | |
|---|---|---|
| **Felagið** | Fótbóltssamband Føroya<br>Gundadalur<br>Postboks 3028<br>FO-110 Tórshavn | |
| | Telefon: | 35 19 79 |
| | Heimasíða: | www.football.fo |
| | Heimstaður: | Tórshavn |
| | Roknskaparár: | 1. januar - 31. december |
| **Starvsnevnd** | Christian Andreasen, FO-650 Toftir, forseti<br>Róin Schrøter, FO-850 Hvalba, varaforseti<br>Jóannes Prestá, FO-480 Skála, nevndarlimur<br>Heri á Rógvi, FO-100 Tórshavn, nevndarlimur<br>Anja Rein, FO-100 Tórshavn, nevndarlimur<br>Sólrun Hendriksdóttir Sørensen, FO-230 Húsavík, nevndarlimur<br>Maria Jóhannusardóttir Joensen, FO-650 Toftir, nevndarlimur | |
| **Dagliga leiðsla** | Kristin Dam Ziska, FO-100 Tórshavn, aðalskrivari | |
| **Grannskoðan** | **P/F Januar**<br>løggilt grannskoðanarvirki<br>Óðinshædd 13, Postbox 30, FO-110 Tórshavn<br>Telefon: 31 47 00 - Telefaks: 35 17 01<br>Teldupostur: januar@januar.fo<br>Heimasíða: www.januar.fo | |

## Nýttur roknskaparháttur

Ársfrásøgnin fyri Fótbóltssamband Føroya er uppsett í samsvari við ásetingarnar í ársroknskaparlógini fyri feløg í flokki A, við neyðugum tillagingum, av tí at talan er um eitt fótbóltssamband. Tann nýtti roknskaparhátturin er óbroyttur í mun til undanfarna ár.

### Alment um innrokning og virðisáseting

Í rakstrarroknskapinum verða inntøkur innroknaðar, so hvørt tær verða vunnar. Sama er galdandi fyri virðisjavningar av fíggjarligum ognum og skyldum. Í rakstrarroknskapinum verða somuleiðis allir kostnaðir innroknaðir, herímillum avskrivingar, niðurskrivingar, avsettar skyldur og afturføringar, sum standast av broyttum roknskaparligum metingum av upphæddum, ið áður hava verið innroknaðar í rakstrarroknskapinum.

Ognir verða innroknaðar í fíggjarstøðuna, tá sannlíkt er, at tær í framtíðini geva felagnum fíggjarligar fyrimunir, og virðið av ognini kann ásetast álítandi.

Skyldur verða innroknaðar í fíggjarstøðuna, tá sannlíkt er, at tær í framtíðini taka fíggjarligar fyrimunir úr felagnum, og virðið av skylduni kann ásetast álítandi.

Við fyrstu innrokning verða ognir og skyldur virðisásettar til útveganarvirði. Síðani verða ognir og skyldur virðisásettar, sum greitt er frá niðanfyri um einstøku roknskaparpostarnar.

Við innrokning og virðisáseting verður atlit tikið at væntaðum tapi og váða, ið vísa seg, áðrenn ársfrásøgnin er liðug, og sum viðvíkja viðurskiftum, sum vóru til staðar við roknskaparlok.

### Umrokning av fremmandum gjaldoyra

Handlar í fremmandum gjaldoyra verða umroknaðir til kursin, sum er galdandi á handilsdegnum. Gjaldoyrakursmunir, millum handilsdagin og gjaldsdagin, verða innroknaðir í rakstrarroknskapin sum ein fíggjarpostur.

Áogn, skuld og aðrir peningaligir postar í fremmandum gjaldoyra, sum ikki eru avroknaðir við roknskaparlok, verða umroknaðir til gjaldoyrakursin við roknskaparlok. Munurin millum gjaldoyrakursin við roknskaparlok og kursin, ið var galdandi á upptøkudegnum, verður innroknaður í rakstrarroknskapin undir fíggjarpostum.

Støðisogn, ið er keypt í fremmandum gjaldoyra, verður virðisásett til kursin á handilsdegnum.

## Nýttur roknskaparháttur

# Rakstrarroknskapur

**Inntøkur**

Inntøkan er øll fakturerað inntøka, har vøran ella tænastan er veitt keyparinum innan árslok, umframt atgongumerkjasøla.

Stuðul og aðrar sáttmálatengdar inntøkur verða tiknar við og tíðargreinaðar, samsvarandi sáttmála-innihaldinum.

**Kostnaðir**

Rakstrarkostnaður fevnir um allan kostnað, sum knýtir seg til høvuðsraksturin hjá FSF.

**Fyrisitingarkostnaður**

Fyrisitingarkostnaður er kostnaður, ið er farin til at leiða og at fyrisita fótbóltssambandið, íroknað kostnað til fyrisitingarstarvsfólk, leiðslu, skrivstovuhøli, skrivstovukostnað og avskrivingar. Mvg-regulering svarar til tann partin av meirvirðisgjaldinum, sum FSF ikki fær endurrindað. Endurrindanin er bert lutvís.

**Stuðul**

Stuðul umfatar kostnað, har FSF stuðlar. Hetta umfatar Menning av Føroyskum Fótbóltsfeløgum, kunning um heimligu kappingarnar, og annan kostnað, ið ikki beinleiðis viðvíkur virkseminum hjá FSF.

**Fíggjarpostar**

Fíggjarligir postar umfata rentuinntøkur og -kostnaðir umframt staðfestan og óstaðfestan kursvinning og -tap viðvíkjandi fíggjarligum ognum og skyldum. Fíggjarligar inntøkur og kostnaðir verða innroknað í rakstrarroknskapin við teimum upphæddum, sum viðvíkja roknskaparárinum.

# Fíggjarstøðan

**Materiell støðisogn**

Bygningar, rakstrargøgn og innbúgv verða tikin við til útveganarvirði, frádrigið akkumuleraðar avskrivingar og niðurskrivingar.

Avskrivingargrundarlagið er útveganarvirði við væntaðum restvirði eftir lokna nýtslutíð frádrignum.

Útveganarvirðið er keypsprísurin, umframt kostnað, ið beinleiðis er knýttur at ognini, til hon er klár at taka í nýtslu.

Jøvn avskriving verður framd grundað á fylgjandi metingar av væntaðu livitíðini og restvirðir:

| | Livitíð | Restvirðið |
|---|---|---|
| Bygningar | 25 - 30 ár | 0 % |
| Onnur tól, rakstrargøgn og innbúgv | 3-5 ár | 0-20 % |

## Nýttur roknskaparháttur

Smáamboð við útveganarvirði undir 20 t.kr. verða útreiðsluførd í útveganarárinum.

Vinningur ella tap við at avhenda materiella støðisogn verður uppgjørdur sum munurin millum sølupris og roknskaparliga virðið á søludegnum, frádrigið sølukostnað. Vinningur ella tap verður innroknað í rakstrarroknskapin undir avskrivingum.

Íløgur, ið eru fíggjaðar við stuðli, ella sum eru gjørdar saman við øðrum, verða upptiknar netto og FSF-parturin avskrivaður yvir raksturin. Stuðul verður mótroknaður í bruttoíløgum.

**Goymslur**

Útveganarvirðið á goymslum verður roknað sum keypsvirði, umframt flutningsgjald.

**Áogn**

Áogn verður virðisásett til amortiserað útveganarvirði, sum vanliga svarar til áljóðandi virði. Fyri at standa ímóti møguligum tapi verður niðurskrivað til nettorealisatiónsvirðið.

**Aðrar avsettar skyldur**

Stuðul til íløgur hjá feløgum umfatar kostnað har FSF hevur játtað at stuðla verkætlanum, ið eru viðvirkandi til menningina av Føroyskum feløgum, og øðrum íløgum hjá feløgum.

**Skuld**

Skuld, sum fevnir um vøru- og tænastuskuld, og aðra skuld, verður tikin við til amortiserað útveganarvirði, sum vanliga er áljóðandi virðið.

## Rakstrarroknskapur

| Nota | | 2025<br>kr. | 2024<br>kr. |
|---|---|---|---|
| 2 | Inntøkur | 86.337.666 | 74.167.765 |
| 3,4 | Kostnaður | -49.542.467 | -42.585.961 |
| | **Bruttoúrslit** | **36.795.199** | **31.581.804** |
| 4 | Fyrisiting | -23.037.200 | -21.051.338 |
| 5 | Media og marketing | -4.781.399 | -4.427.790 |
| 6 | Avskrivingar | -1.032.274 | -1.032.274 |
| 7 | Stuðul | -6.480.253 | -4.623.166 |
| | **Fyrisitingarkostnaður tils.** | **-35.331.126** | **-31.134.568** |
| | **Rakstrarúrslit** | **1.464.073** | **447.236** |
| | Fíggjarligar inntøkur | 74.414 | 314.234 |
| | Fíggjarligir kostnaðir | -117.973 | -91.014 |
| | **Ársúrslit** | **1.420.514** | **670.456** |

**Uppskot til býti av úrsliti**

| | 2025 | 2024 |
|---|---|---|
| Flutt úrslit | 1.420.514 | 670.456 |
| **Býtt tilsamans** | **1.420.514** | **670.456** |

# Fíggjarstøða

**OGN**

| Nota | | 2025<br>kr. | 2024<br>kr. |
|---|---|---|---|
| | **Støðisogn** | | |
| 9 | Leikvallir | 25.498.293 | 26.530.567 |
| | Materiell støðisogn tilsamans | 25.498.293 | 26.530.567 |
| | **Støðisogn tilsamans** | **25.498.293** | **26.530.567** |
| | **Ogn í umferð** | | |
| | Fótbóltslutir | 98.997 | 179.342 |
| | Vørugoymslur tilsamans | 98.997 | 179.342 |
| | Skuldarar | 23.083.890 | 28.229.735 |
| | Meirvirðisgjald | 333.262 | 283.073 |
| | Onnur áogn | 234.438 | 61.095 |
| | Áogn tilsamans | 23.651.590 | 28.573.903 |
| | Peningur | 14.989.990 | 15.988.119 |
| | **Ogn í umferð tilsamans** | **38.740.577** | **44.741.364** |
| | **OGN TILSAMANS** | **64.238.870** | **71.271.931** |

## Fíggjarstøða

| Nota | SKYLDUR | 2025<br>kr. | 2024<br>kr. |
|---|---|---|---|
| | **Eginogn** | | |
| 10 | Flutt úrslit | 31.333.923 | 29.913.410 |
| | **Eginogn tilsamans** | **31.333.923** | **29.913.410** |
| | **Avsettar skyldur** | | |
| 11 | Avsetingar til íløgustuðul v.m. | 11.343.374 | 13.143.374 |
| 12 | Stuðul til feløgini | 2.744.690 | 1.698.905 |
| | **Avsettar skyldur tilsamans** | **14.088.064** | **14.842.279** |
| | **Skuld** | | |
| | Ognarar | 7.738.070 | 5.820.328 |
| | Forútgoldið, viðv. sjónvarpsrættindum v.m. | 10.544.432 | 18.685.245 |
| | Onnur skuld | 534.381 | 2.010.669 |
| | Stuttfreistað skuld tilsamans | 18.816.883 | 26.516.242 |
| | **Skuld tilsamans** | **18.816.883** | **26.516.242** |
| | **SKYLDUR TILSAMANS** | **64.238.870** | **71.271.931** |

## Notur

### 1. Høvðusvirksemi hjá FSF

Virksemið hjá fótbóltssambandinum er støðugt at menna, stuðla og vekja áhuga fyri fótbóltsspælinum, gera reglur og skipa fyri fótbóltsspælinum í Føroyum, samsvarandi Fair Play, sameina útbúgvingarligu, mentanarligu og menniskjaligu virðini í fótbóltsspælinum og serliga við at fremja ungdóms- og menningarætlanir. Virksemi umfatar m.a.

- At skipa fyri lands- og steypakappingum og øðrum fótbóltstiltøkum í Føroyum.
- At gera reglur og fyriskipanir og tryggja, at hesar verða hildnar.
- At verja áhugamál limanna.
- At virða og forða fyri brotum á viðtøkum, reglugerðum, boðum og avgerðum hjá FIFA, UEFA og FSF eins og "Laws of the Game" og tryggja, at hesi verða vird av limunum.
- At forða øllum, ið kann koma dystum ella kappingum í vanda ella vera fótbóltsspælinum til skaða
- At góðkenna og hava eftirlit við øllum fótbóltsdystum, sum verða spældir í Føroyum.
- At skipa fyri øllum altjóða ítróttarligum samstarvi innan fótbólt.
- At skipa fyri altjóða- og øðrum kappingum.

| | 2025<br>kr. | 2024<br>kr. |
|---|---|---|

### 2. Inntøkur

| | 2025 kr. | 2024 kr. |
|---|---|---|
| Atgongumerkir | 1.738.483 | 622.974 |
| Luttøkugjald, kapping og skeið | 1.528.790 | 1.193.331 |
| Kærugjøld | 37.800 | 76.800 |
| Kappingarskipanin og lýsingar | 2.863.000 | 2.727.000 |
| Sendirættindi v.m. | 25.580.000 | 25.580.000 |
| ÍSF - Landskassastuðul | 125.000 | 0 |
| UEFA v.m. | 23.912.603 | 24.036.485 |
| FIFA | 9.776.411 | 11.958.556 |
| ÍSF - Ítróttarvedding v.m. | 1.950.000 | 1.550.000 |
| Dómarakonventiónin | 745.000 | 745.000 |
| Marketing og media | 6.130.353 | 5.545.380 |
| Inntøkur í sambandi við endaspæl í Føroyum | 11.615.553 | 0 |
| Aðrar inntøkur | 334.673 | 132.239 |
| | **86.337.666** | **74.167.765** |

### 3. Kostnaður

| | 2025 kr. | 2024 kr. |
|---|---|---|
| Landslið: | | |
| A-Landsliðið, menn | 17.563.304 | 15.064.630 |
| U-21 Landsliðið, menn | 3.044.709 | 2.497.971 |
| U-19 Landsliðið, menn | 1.016.184 | 874.633 |
| U-17 Landsliðið, menn | 1.694.967 | 1.361.023 |
| U-16 Landslið, menn | 398.965 | 455.539 |
| Flutt til næstu síðu | 23.718.129 | 20.253.796 |

# Notur

| | | 2025<br>kr. | 2024<br>kr. |
|---|---|---|---|
| **3.** | **Kostnaður (framhald)** | | |
| | Flutt frá undanfarnu síðu | 23.718.129 | 20.253.796 |
| | U-15 Landsliðið, menn | 606.447 | 459.926 |
| | A-Landsliðið, kvinnur | 5.102.669 | 6.129.196 |
| | U-19 Landsliðið, kvinnur | 1.383.776 | 1.426.009 |
| | U-17 Landsliðið, kvinnur | 9.898.155 | 3.625.806 |
| | U-16 Landslið, kvinnur | 318.918 | 1.176.314 |
| | U-15 Landsliðið, kvinnur | 518.538 | 685.360 |
| | **Landslið Tilsamans** | **41.546.632** | **33.756.407** |
| Nevndir: | | | |
| | Kappingarnevndin | 938.275 | 747.086 |
| | Dómaranevndin | 3.115.998 | 3.282.085 |
| | Útbúgvingarnevndin | 3.941.562 | 4.800.383 |
| | | **49.542.467** | **42.585.961** |
| **4.** | **Fyrisiting** | | |
| | Lønir og samsýningar | 9.751.226 | 9.122.302 |
| | Arbeiðsmarknaðargjøld og eftirlønir | 5.345.854 | 4.331.371 |
| | Skrivstovuhald | 837.733 | 918.771 |
| | Telefon, internet | 358.680 | 364.230 |
| | Ferðir og uppihald | 398.189 | 705.600 |
| | Umboðan | 29.537 | 97.177 |
| | Fundir | 1.745.759 | 1.585.499 |
| | Strategiskt arbeiði | 13.413 | 0 |
| | Bilar | 115.992 | 127.333 |
| | Húsið | 1.876.716 | 1.685.508 |
| | Sakførari, ráðgeving og grannskoðan | 163.228 | 173.004 |
| | Regulering MVG | 2.142.961 | 1.513.608 |
| | Annar kostnaður | 119.688 | 404.715 |
| | Avskrivað skuldarar / Avsett í móti tap | 138.224 | 22.220 |
| | | **23.037.200** | **21.051.338** |
| **5.** | **Media og marketing** | | |
| | Media Marketing | 4.781.399 | 4.427.790 |
| | | **4.781.399** | **4.427.790** |

| | | 2025<br>kr. | 2024<br>kr. |
|---|---|---|---|
| **6.** | **Avskrivingar** | | |
| | Avskrivingar FSF-húsið | 1.032.274 | 1.032.274 |
| | | **1.032.274** | **1.032.274** |
| **7.** | **Stuðul** | | |
| | Kunning í sambandi við kappingar Føroyum | 5.310 | 9.520 |
| | MAFF stuðul | 2.629.999 | 2.960.000 |
| | Annar stuðul | 3.844.944 | 1.653.646 |
| | | **6.480.253** | **4.623.166** |
| **8.** | **Starvsfólkakostnaður** | | |
| | Fyrisitingarlønir og samsýningar | 9.751.226 | 9.122.302 |
| | Nevndararbeiði | 707.066 | 475.200 |
| | Aðrar samsýningar, venjarar, dómarar, leikarar o.o. | 18.874.141 | 15.552.895 |
| | Bonus | 794.457 | 191.082 |
| | Arbeiðsmarknaðargjøld og eftirlønir | 5.345.854 | 4.331.371 |
| | | **35.472.744** | **29.672.850** |

## 9. Materiell støðisogn

| | Leikvallir | Sjónvarps-útgerð | Rakstrargøgn |
|---|---|---|---|
| Útveganarvirði 1. januar 2025 | 284.431.897 | 5.432.661 | 3.607.078 |
| Frágongd | 0 | 0 | -1.508.848 |
| **Útveganarvirði** | **284.431.897** | **5.432.661** | **2.098.230** |
| Kommunupartur | -116.597.893 | 0 | 0 |
| Stuðul U.E.F.A. (Hattrick) | -134.909.196 | -5.432.661 | 0 |
| **Stuðulsfígging tils.** | **-251.507.089** | **-5.432.661** | **0** |
| Avskrivingar 1. januar 2025 | 6.394.241 | 0 | 3.607.078 |
| Avskrivingar í árinum | 1.032.274 | 0 | 0 |
| Afturførdar avskrivingar | 0 | 0 | -1.508.848 |
| **Av- og niðurskrivingar** | **7.426.515** | **0** | **2.098.230** |
| **Roknskaparligt virði** | **25.498.293** | **0** | **0** |

## 10. Flutt úrslit

| | | |
|---|---|---|
| Flutt úrslit 1. januar 2025 | 29.913.409 | 29.242.954 |
| Fluttur vinningur ella hall í árinum | 1.420.514 | 670.456 |
| | **31.333.923** | **29.913.410** |

## 11. Avsetingar til íløgustuðul v.m.

| | | |
|---|---|---|
| Avsett til íløgustuðul | 11.343.374 | 13.143.374 |
| | **11.343.374** | **13.143.374** |

FSF hevur bundið seg til at stuðla limafeløgnum til íløgukostnað til graslíkisvallir, ljósviðurskifti og kringumstøður á vøllinum. Játtanarupphæddin er við árslok 11,3 mió.kr. herav hevur FSF játtað seg at stuðla verkætlanum til vallar- og ljósumstøður hjá feløgum fyri tils. 5,0 mió.kr.

## 12. Stuðul til feløgini

| | | |
|---|---|---|
| Avsetingar til Solidaritetsskipan 2024-2028 | 2.226.285 | 1.000.000 |
| Stuðul til feløgini | 518.405 | 698.905 |
| | **2.744.690** | **1.698.905** |